

# Samkomublaðið fyri nov

# 2015

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Tú gert mun!

***Trygvi Petersen***

”Uttan trúgv er tað ómøguligt at toknast Honum. Tí tann, sum stígur fram fyri Gud, má trúgva, at Hann er, og at Hann lønir teimum, ið søkja Hann.” (Hebr 11:6)

Tíðarandin sigur, at alt skal prógvast. Eg trúgvi, at tað er tí, at vit hava fleiri av okkara ættarliði, sum ynskja prógv fyri, at ein Gud er til ella ikki trúgva, at Gud er til.

Tí er tað týdningarmiklari enn nakrantíð, at tey tekin, sum Jesus segði skuldu fylgja okkum, eru virkin í gjøgnum okkum. Markus 16:17–18: “Og hesi tekin skulu fylgja teimum, ið trúgva: Í navni Mínum skulu tey reka út illar andar; tey skulu tala við nýggjum tungum; tey skulu taka ormar upp í hendurnar; drekka tey eitur, skal tað ikki saka tey; á sjúk skulu tey leggja hendurnar, og tey skulu verða grødd.“

Tað hava verið tíðir í mínum lívi, har eg sjálvur havi havt mín iva, um Gud er til, og eg havi spurt meg sjálvan: hvar hesi tekin eru? Tá er gott at kunna venda aftur til Orðið og velja at trúgva tí, sum skrivað stendur – og ikki minst at minnast aftur á ta grøðing og aðrar upplivingar, eg havi havt saman við Gudi og tey svar, eg havi fingið upp á bøn. Eg má velja at trúgva, at tað ikki bara var tilfeldugt, sum tingini lagaðu seg í mínum upplivingum saman við Honum.

Kæri lesari! Hvat kanst tú gera fyri at vísa øðrum, at Gud er til, hevur kraft at grøða, umbroyta, seta í frælsi, so onnur kunnu uppliva Gud? - Jú, tað er av alstórum týdningi, at vit brúka tann myndugleika, Gud hevur givið okkum, at kenna Guds rødd, og at vit tora at gera tað, Harrin biður okkum. Tá er tað eisini týdningarmikið, at tú veist, hvør tú ert í Kristusi, og hvat Kristus heldur/sigur um teg. Tá fært tú dirvi og áræði at tosa og biðja fyri tínum arbeiðsfelaga, skúlafelaga, vinum og frændum, konu og børnum, so at tey uppliva Gud gjøgnum ta kraft, sum tey uppliva og blíva sannførd um, at Gud er ein persónligur Gud, og Hann elskar tey. Tú gert mun!

# Skrá fyri nov

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 2. nov. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 3. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 4. nov. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 5. nov. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 7. nov. | kl. 21.00: | Onki AWAKE - Felags lovsangstiltak í Oasuni kl. 20 |
| Sunnudagur | 8 nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 9. nov. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 10. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 11. nov. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 14. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við teimum, ið hava verið á Youth |
| Sunnudagur | 15. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við luttøku frá mansleguni |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 16. nov. | kl. 19.00: | Felags bønarmøti í Karis, Klaksvík (fríkirkjunetverkið) |
| Týsdagur | 17. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 18. nov. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 19. nov. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 21. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Karstin Justesen |
| | | kl. 18.00: | Ungdóms-Alphaskeið byrjar |
| Sunnudagur | 22. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Kaj og Leif o.fl. (missiónsmøti)<br>Jansy Frederiksberg hevur framførslu |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 23. nov. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 24. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 25. nov. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 28. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Ingibjørn Royðutoft |
| Sunnudagur | 29. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen.<br>Evni: breyðbróting |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 30. nov. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 1. des. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 2. des. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 3. des. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 5. des. | kl. 20.00: | AWAKE við jólahugna, baka smákøkur o.a. |
| Sunnudagur | 6. des. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum<br>Suppa og flutes fæst til keyps eftir møtið (25 kr.) |

# Lýsingar

**Felags lovsangstiltak í Oasuni**
Ungdómsleiðslurnar í frísamkomunum í Føroyum koma javnan saman til bøn fyri at skapa betri einleika millum samkomurnar. Nú verður so skipað fyri einum bønar- og lovsangskvøldi, har ætlanin er at savnað allan ungdóm úr frísamkomunum saman til bøn. Endamálið er at styrkja um einleikan, bæði andaligt og tímiligt. Tiltakið verður í Oasuni leygarkvøldið 7. novembur kl. 20.

**AWAKE kl. 20:00**
Um veturin kunnu kvøldini ofta tykjast long, og tað kann kennast sum at man bíðar til kl. gerst 21, og AWAKE skal byrja. Men hetta ynskja vit at broyta í vetur! AWAKE verður flutt til kl. 20:00 frá leygarkvøldinum 14. november. Hetta gevur teimum ungu betri møguleika fyri at hugna sær saman eftir AWAKE, og so orkar man eisini betur upp aftur á morgunmøtið sunnumorgnar :)

**U-Alphaskeið**
Ungdóms-Alphaskeið byrjar í Kelduni leygardagin 21. november kl. 18.00. Skeiðið er til tey, sum ganga í 6. – 9. flokki. U-Alpha er eitt grundleggjandi skeið um kristnitrúnna. Á skránni er eisini stuttleiki og matur⌧ Kostnaður 200 kr. Matur og tilfar er íroknað. Les meira um U-Alpha á keldan.fo

**Barna og familjujólaveitslan**
Verður sunnudagin **13. des. kl. 16.00.**

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584